

um eg havi rætt, men eg haldi sum nevnt, at tað eigur at bera til.

Við í føroysku skipanini eru eisini stongdar leiðir. Tað haldi eg vera skilagott, tí tá kunnu leiðir avmarkast, har ymiskar grundir eru til ikki at fiska á teimum. Eisini er gott, at tað eru leiðir, har fiskur kann fáa frið, tí fiskur er ikki býttari enn allir aðrir skapningar. Hann fer hagar, sum hann fær frið. Eru tað leiðir, sum tað er liviligt hjá fiski at vera á, sum stongdar eru, vil tað eisini verja fyri, at fiskurin verður trároyndur, tí hann fær sum nevnt frið har. Hetta er ein góð skipan, um hon verður brúkt við skili. Tað man vera minst helmingurin av leiðini innan fyri 200 metra dýpi, sum er friðað fyri troling.



-Fiskivinnuskipanin, sum vit fingu í 1996, er góð, men av tí at hon byggir á veiðiorku, má eisini fylgjast við, hvussu veiðiorkan er, og hvussu hon broytist

## Niðurfisking og uppbygging av fiskastovnum

Tað verður nógv tosað um at niðurfiska stovnarnar, og hvussu teir kunnu byggjast uppaftur. Tað hevur víst seg, at fiskiskapur hevur ikki tann størsta týdningin fyri, hvussu stórur ein fiskastovnur er. Hann hevur týdning, men aðrir faktorar hava stóran týdning.

Tað verður sagt av mongum, at nú skulu fiskastovnarnir byggjast uppaftur, og tað er tað sama sum at minka fiskiskapin ella heilt halda uppat. Hetta hevur víst seg ikki at passa. Tað eru mong dømir um, at fiskur kemur ikki aftur, um tað verður steðgað við at fiska.

Eg havi ikki hoyrt vísindina úttalað seg enn um hetta, men eg vænti, tað kemur. Men tað gongur ofta so leingi, áðrenn tað frá vísindaligari síðu verður ásannð, at nakað ikki er, sum tey hava hildið. Eg haldi meg ikki vera nakran vísindamann, men so mikið havi eg av royndum á hesum øki, at eg tori at úttala meg so avgjørdur. Tað eru aðrir faktorar, sum gera, at ein stovnur veksur ella minkar. Eitt annað er, at um vit skulu hava javnan fiskiskap, so skulu vit so langt niður í veiðu, at tað vil vera høpisleyst at gera tað. Vit mugu liva við, at tað er meira fiskur til eina tíð enn eina aðra. Tað hava vit liva við leingi, og tað ber eisini til at halda fram við tí.

## Kreppur koma og fara

Kreppur vara sjáldan við í nógv ár, og tað ger hendan helst heldur ikki, hóast vit ongantíð vita tað fyri vist. Tær kreppur, sum eg sjálvur havi upplivað, hava vart í nøkur fá ár. So stilla tingini seg aftur hvørt eftir øðrum, t.d. við inflatión, og takið hevur verið at yvirliva tvørturum tað tíðarskeiðið, til tingini hava normaliserað seg aftur. Tað kann vera hart, og fleiri fyritøkur kunnu fara av knóranum. Tað í sær sjálvum er kanska ikki so ringt fyri samfelagið, men tað kann taka fast fyri tey, tað rakar. Fyri samfelagið kann tað eisini verða trupult, um tað er ein stórur partur, sum steðgar upp, tí so kann verða leingi at koma í gongd aftur. Tá haldi eg, tað kann vera rætt at hjálpa til fyri at minka um longdina á kreppu-tíðini.

Nógvir føroyingar eru rættiliga mobilir, táið tað kemur til at finna arbeiði uttanlands. Sjómenn, bæði í fiskivinnu, oljuvinnu og í farmavinnuni, hava valla trupulleikar við at finna arbeiði uttanlands, um ov lítið er at gera eina tíð, og tað hevur eisini víst seg at vera møguligt hjá handverkarum at finna arbeiði uttanlands. Hetta kann vera ópraktiskt fyri teir, men fyri at lívbjarga sær og sínum kann tað vera ein loysn. Verða teir búgvandi í Føroyum, so er tað inntøka fyri landið, og aðrar staðir verður tað roknað sum ein fyrimunur, at borgarar í landinum virka í útlandinum, serstakliga um tað er arbeiði, sum krevur ávísa útbúgving.

Tað er nógv frammi fyri tíðina, at føroyingar velja sær eina útbúgving uttanlands, sum ikki kann brúkast í Føroyum, tí tað slagið av vinnu, teir hava útbúgvið seg til, ikki er í landinum. Eg haldi ikki, at Føroyar hava skyldu til at útvega teimum arbeiði, sum fara burtur at lesa, um tey lesa til tað, sum ikki finst í Føroyum. Tá haldi eg, at viljin til at koma heimaftur, ikki er nóg stórur, men lesa tey fyri at útbúgva seg til nakað, sum tey sjálvi kunnu seta á stovn í Føroyum, so er tað sjálvandi nakað annað.

Vit hava yvirlivað fleiri kreppur, og vónandi koma vit ígjøgnum hesa við, og at alt, sum gerast kann, eigur at verða gjørt, fyri at kreppan ikki verður alt ov hørð fyri fólkið, her býr. Tað eru hóast alt ikki so fá, sum koma eftir, at grasið í Føroyum er kanska líka grønt sum aðrastaðni.